

*Mari Boine hugtók føroysku fjøldina mánakvøldið í Norðurlandahúsinum*



## Roknskapur fyri tíðarskeiðið 1. januar 2003 - 30. juni 2003

| RAKSTRARROKNSKAPUR | 1/1-30/6-2003 | 1/1-30/6-2002 |
|---|---|---|
| | tkr. | tkr. |
| Rentuinntøkur v.m. | 79 | 119 |
| Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur v.m. | 1.693 | 3.960 |
| Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir v.m. | -134 | -206 |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra v.m. | 346 | 60 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 2.827 | 1.320 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **4.811** | **5.253** |
| Útreiðslur til starvsfólk v.m. og umsiting | -3.809 | -3.702 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | -96 | -179 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | -772 | -830 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **134** | **542** |
| Óvanligar útreiðslur | -93 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **41** | **542** |
| Skattur | 0 | -29 |
| **Úrslit** | **41** | **513** |
| **FÍGGJARSTØÐA** | **30/6-2003** | **30/6-2002** |
| **Ogn** | | |
| Áogn hjá kreditstovnum v.m. | 7.216 | 8.276 |
| Lánsbrøv v.m. | 10 | 500 |
| Partabrøv v.m. | 2.491 | 2.478 |
| Ítøkiligar ognir | 151 | 380 |
| Onnur ogn | 39 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 2.393 | 992 |
| **Ogn til samans** | **12.300** | **12.626** |
| **Skuld, eginpeningur og avsetingar** | | |
| Onnur skuld | 446 | 496 |
| Tíðaravmarkingar | 382 | 258 |
| **Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 10.000 | 10.000 |
| Yvirkursgrunnur | 1.914 | 1.914 |
| Flutt úrslit tilsamans | -442 | -42 |
| **Eginpeningur til samans** | **11.472** | **11.872** |
| **Skuld, eginpeningur og avsetingar** | **12.300** | **12.626** |
| **Tøl, ið ikki eru tikin við í fíggjarstøðuna** | | |
| Ábyrgdir | 116 | 2.044 |

Skrásetingar nr. p/f 2997

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 1500 • fax 35 1501
www.kaupthing.fo


# Sámuligt

**Áhoyrararnir í Norðurlandahúsinum vóru ikki eina løtu í iva um, at Mari Boine í allar mátar skaraði framúr mánakvøldið**

FRÁSØGN
*Heri á Rógvi*

Mari Boine er ein sermerkt songkvinna.

Ikki ger hon tað stóra burturúr at flyta seg runt á pallinum, men sambandi við áhoyrarnar tóktist als ikki at bila, tá hon framførdi í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið.

Eitt sindur seinkað trein hon á pallin saman við fimm tónleikarunum. Og tey gjørdu ikki nakað hóvasták burturúr. Mari Boine sermerkta og væl eisini frálíka songkvinnan saman við fimm monnum í gerandisklæðum. Øll virkaðu tey sum um, at hetta við at frammanfyri hampuliga stórari fjøld í Norðurlandahúsinum var nakað, tey gjørdu hvønn dag.

Og tað var eisini ein ávísur friður yvir framførsluni. So skjótt tey eru komin á pallin byrja fyrsta lagið – sermerkt og ógvuliga spennandi, og fjøldin er beinanvegin við. Sámiska høvuðsnavnið á ársins Listastevnu syngur á sámiskan ópolerað og líkatil – og ógvuliga væl. Tað er sámiskur sangur blandaður saman við nútímans tónleik. Frá tvørfloytu til elektronisk loops.

Framførslan er innilig og óhugnalig væl vand. Burtursæð frá fáum broytingum í ljóðmyndini koyrir framførslan sum ein væl smurd maskina.

Men tað er kortini ikki fult hús. Ikki tí. Hetta er væl tað besta høvuðsnavnið higartil í trý ára longu søgu Listastevnunnar. Men eitt fult hús høvdu valla ikki nógv roknað, og tað ger lítið fyri tey, sum eru har, men fleiri kundi óivað fingið gleði av teimum sløkum tveimum tímunum við nøkrum av tí mest modernaða upprunatónleiki, sum væl hevur vitjað á klettunum.

Tankin um at nýta 225 kr. fyri at hoyra sámiskan tónleik og missa allar tær góðu løturnar frammanfyri sjónvarpinum eitt mánakvøld, hevur mestur fingið tey flestu at setast aftur. Synd fyri tey er dómurin frá teimum mongu áhoyrarunum, sum kortini ikki fyltu alt húsið – fyltust øll innan av hesari serstøku upplivingini.

Tað gongur fyri sovítt slag í slag, framførslan. Hvørt lagið er ótrúliga væl lagt til rættis. Sjálv stendur Mari Boine mest still á pallinum. Fyrsta tíman flytir hon seg bert nøkur fá fet. Skiftir búnað nakrar ferðir. Sigur lítið, men fangar, stillisliga. Tað kann valla sigast á annan hátt enn við hesari royndini at skriva poetiskt í støvum. Tí hon er bæði poetisk og virkar sum í einum transi á pallinum.

Sangirnar eru allir ógvuliga livandi, hóast eg ikki skilji eitt orð av, hvat hon sigur. Haldi kortini, at eg skilji, at tað er gott. Tað hildu í øllum førum hini.

Nøkur sámisk dansifet gravar Mari Boine eisini fram á pallinum. Hinir tónleikararnir í gerandisklæðunum standa mestsum stillir meðan teir spæla. Dansifetini eru kortini bert ein lítil løtu av framførsluni. Tað mesta fer við at syngja sámisk løg og práta stillisliga við áhoyrarnar.

»Eg haldi, at hesin sangurin kann vera um...«, sigur Mari Boine, sum í fleiri førum leggur fleiri týdningar í sínar sangir – alt eftir hvussu lyndi virkar.

Vinnarin av tónleikavirðislønini hjá Norðurlandaráðnum fekk eftir fleiri eykaløg blómur fyri Sunleifi Rasmussen, og fjøldin heilsar við at fara føtur og lógvabrestum. Tey komu ikki innaftur, tá føroyska fjøldin ynskir at klappa tey innaftur á pallin – men samager.

Og hesaferð var tað so eitt høvuðsnavn, sum fangaði og gav nakað til fólkið. Og nógv vildu fegin staðið enn, og fingið nógv meiri Boine.





Pakkhúsið í Vági:

# Yrkjarar á ferð



*Yrkjarar á ferð. Carl Johan Jensen, Jóannes Nielsen og Tóroddur Poulsen vitjaðu Stóra Pakkhús í Vági sunnukvøldið í samband við Listastevnuna*

**Listastevnan er í stóran mun savnað um miðstaðarøkið, men treyðugt so eru tiltøk í útjaðaranum. Tiltak við upplestri av yrkingum hevur ferðast kring landið við nøkrum av fremstu yrkjarunum við pjøkanum fullum av veingjaðum orðum. Góð orð, bergtikinir lurtarar. Nógv orð, fáir lurtarar**

LISTASTEVNA
*Dagfinn Olsen*

Tiltakið við yrkjarum undir tjøraðum plankum byrjaði í Müllers Pakkhúsi í Havn og hevur síðani ferðast.

Tað eru teir 3 Carl Johan Jensen, Jóannes Nielsen og Tóroddur Nielsen, ið hava tikið pjøkan á bakið og eru farnir á ferð fyri at lesa upp egnar yrkingar í hugnaligum umhvørvi.

Vitjað hevur verið í Fuglafirði og sunnukvøldið lósu teir upp í Stóra Pakkhúsi í Vági.

## Góð orð, fá fólk

Kim Simonsen hevur í blaðnum í gjár neyva gjøgnumgongd av sjálvum yrkingunum, ið skøldini høvdu valt at lesa í Havn. Skráin var næstan hin sama, um ikki júst, í Vági, so her verður ikki endurtikið.

Samd kunnu vit tó vera í orðunum hjá fyrrnevnda greinskrivara, at Carl Johan er hin mest akademiski, Jóannes hin hugtakandi og kensluborni og Tóroddur hin stuttligasti.

Stóra Pakkhús er hóskandi karmur, tó talan er ikki um tjøraðar plankar. Hóast tjøran kanska ikki er til staðar í nøkrum av framførslustøðunum, so eru hetta støð, har søgan um farnar tíðir livir millum skins og hold.

Í dimminum í Pakkhúsinum sunnukvøldið var einasta tjøran í roykinum frá vindlunum, ið sendu síni roykboð undir loftið, meðan yrkjarar lótu síni boð ljóma, sum teir meta, at boðini, yrkingarnar, skulu ljóða.

Carl Johan legði fyri við yrkingum og sonettum, Jóannes honum á baki við sínum kendu yrkingum við eyðkenda orðalagnum, og Tóroddur við sínum stuttligu, beinraknu yrkingum, lisnar á undirfullan hátt. Onkur vildi kanska tikið seinna stavilsi í navnið høvundans og flutt í enska merking; odd = løgið. Tað er bara ein Tóroddur, men gott at hann er.

Allir megnaðu teir at fáa lurtararnar at rakna við av og á, antin í játtandi keipum og stunan ella í látri.

Meira skal ikki sigast um innihaldið, sum er gjølla viðgjørt frammanundan.

Men hinvegin eiga yrkjarar rós og fólk annars rís:

Hóast bert eini 10 -15 fólk høvdu leitað sær at hoyra veingjaðu orðini, so lósu høvundarnir, sum var húsið fult, og tað eiga teir rós fyri. »Framførslan« var til UG og var innilig.

Hinvegin kann kanska spurnartekin setast við, hvar lurtararnir vóru, tí bert eini 10 fólk er ikki at reypa av og skal góð grundgeving til, áðrenn útjaðarin kann krevja tiltøk av Listastevnuni næstuferð, tá undirtøka ikki er fyri tí, ið er.

Suðuroyggin hevur av listakøkuni fingið eina framsýning í Gallarí Oynni og so tiltakið við yrkingum sunnukvøldið. Kanska eitt heldur tunt ella tungt tiltak, tykjast summi, og halda seg tí burtur, men tey í hinvegin leitaðu sær í Pakkhúsið sunnukvøldið fingu eitt gott kvøld við góðum yrkjarum, ið vóri væl fyri, høvdu nakað upp á hjartað og sum lótu av sínum skaldagávum, uttan mun til nøgd av oyrum, ið hoyrdu.

Og tað er nokk eisini tað, ið tað snýr seg um. Inniligt og tætt. Yrkjarin yrkir fyri sær sjálvum, fyri tí einstaka, fyri fjøldini. Orð megna at snúgva sær, har plankarnir er tættastir fyri og orðið hevur í søguni mangar sigrar at vísa á.

Og hóast stóra Pakkhús ikki varð pakkað við lurtarum, so fingu tey møttu óinnpakkaðar sannleikar og hugarensl frá nøkrum av fyndugastu pennum í landinum.

## Rættleiðing

»tey orðini sum leitaðu eftir nýggjum landi
vendu sær í flognum og komu aftur
sum rovfuglar við sterkum klóm
og fremmandum eygum«

Orðini, Líkasum, Rói Patursson, 1985

At Listastevnan og Útvarpið í felag varpa út nýggjar tekstir er bara at fegnast um.

Leygarkvøldið vórðu tó tríggir stuttir tekstir hjá mær lisnir upp í táttinum »Dagsins yrking«, og tíverri blivu allir tekstirnir lisnir upp sum ein, hóast eg ikki hevði gjørt hesa raðfylgjuna, og ljóðaðu tekstirnir tí ikki, sum eg upprunaliga kendi teir. Eisini er okkurt einstakt orð komið skeivt fyri. T.v.s. at hvørki høvd ella hali var á upplestri og innihaldi. Hvussu slíkt kann henda, skilji eg ikki.

Eg gjørdi vart við mistakið hjá Listastevnuni í Dimmu í gjár, men nú síggi eg, at Sosialurin í týsdagsblaðnum eisini prentar umskrivingina av mínum tekstum. Vónandi er mistakið hjá Listastevnuni hervið rættað.

**Theodor E.D. Olsen**